


www.oljan.fo

**Jan Müller** 09 - 05 - 2013

# Statoil á tekniborðið við arktiskum boriskipi

Oljufelagið Statoil hevur nú tikið eitt stig víðari til at byggja ein nútímans skræddaraseymaðan boriskipaflota til arktisku økini. Talan verður um milliardaupphæddir. Felagið hevur bjóðað veitarum at gera tekningar til nýggja skipaslagið, sum fer at verða merkt av serstøku ísviðurskiftunum. Enn er ikki greitt, hvørji feløg eru biðin um at fara í gongd, men keldur vilja vera við, at GustoMSC, Inocean, Ulstein Sea of Solutions, Aker Solutions og National Oilwell Varco hava fingið fyribils uppgávur at lata design. Talan verður um at boriskip heldur enn pall. Seinni verða so vald út tvey feløg, sum skulu gera arbeiðið liðugt, áðrenn Statoil í 2015 fer eftir boðum frá skipasmiðjum. Mett verður at fyrsta Cat 1 arktiska boriskipið kann latast Statoil í 2017 ella 2018. Statoil hevur leitiloyvi í Barenshavinum, út fyri Alaska og Eystur Kanada. Tað er greitt, at við hesi byggiverkætlanini er Statoil við at gera seg út til at fara undir at bora í Arktis. Longu nú hevur felagið borað nógvar brunnar í Barentshavinum. Felagið arbeiðir saman við øðrum stórum oljufeløgum, eitt nú ConocoPhillips og ExonMobil at bora í Alaska og Kanada. Eftir at Shell gjørdi av at úseta sína boring í Alaska til 2014 hevur Statoil útsett sínar boriverkætlanir har til 2015 ella so.